# Fiskakvinnur til heiðurs og æru

**STANDMYND Í gjár avdúkaði býráðið eina standmynd av einari kvinnu, sum vaskar fisk. - Talan er um eitt symbol fyri tað virksemi, sum er farið fram kring vágirnar her í Havn í einari ikki so fjarari fortíð, segði Jógvan Arge, formaður í Mentanarnevndini hjá býráðnum í røðu**



**AVDÚKAÐ**

*Listamaður og borgarstjóri handan standmyndina av »Kvinnu, ið vaskar fisk«. Formaðurin í Mentanarnevndini, Jógvan Arge og formaðurin í Havnanevndini, Jákup Símun Simonsen, fluttu fram røðu*

Mynd: Álvur Haraldsen

Leo Poulsen

Hetta er eitt súmbol úr einari tíð, tá Føroyar tóku seg fram vinnuliga og fóru at eksportera dygdarvøru, so tað stóð eftir. Vit fiskaðu tosk, sum varð saltaður umborð og síðani varð turkaður til klippfisk undir sólini, segði Jógvan Arge í røðuni, hann helt í sambandi við avdúkingina.

Hann kom inn á tað søguliga í staðnum, har standmyndin nú fer at standa.

Hann nevndi Skibsteds Handil, sum hevði sítt Konslarapakkhús har, sum Fiskacentralurin var. Müllerskipini høvdu sína miðstøð skamt harfrá, og teir høvdu salt og goymslu í sjálvum Müllers Pakkhúsi.

Standmyndina hevur Gianfranco Nonni gjørt. Hann býr suðuri í Vági, og hevur havt samband við Føroyar seinastu átta árini. Hann hevur gjørt ymisk listarverk, sum eisini hava givið honum íblástur til hetta verkið.

Gianfranco Nonni er italiumaður, og tað vóru als ikki so fáir føroyskir klippfiskar, ið mettaðu munnarnar við Miðalhavið. Sostatt er tað heldur ikki av leið, at vita lata ein bacalaoetandi suðureuropeara ímynda sær eitt týdningarmikið súmbol fyri hesa vinnuligu og samfelagsligu menningartíð i Føroyum, segði Jógvan Arge.

### Klippfiskur í søgu

Formaðurin í havnanevndini, Jákup Símun Simonsen, førdi eisini fram røðu, har hann nevndi søguna hjá klippfiskinum, og hvussu hetta hevði kollvelt gerandisdagin hjá kvinnunum.

Hann nam við, hvussu føroyingar fóru til Hetlands at læra seg kynstrið at turka klippfisk, og hvussu handilsmenn við tíðini gjørdu stór turkingarpláss.

Hann kom eisini inn á kjarnan í málinum, nevniliga kvinnurnar, sum fóru at arbeiða í fiski longu langt áðrenn tað var vanligt í Europa, at kvinnurnar komu út á arbeiðsmarknaðin.

Lønin var vørur í handlinum, og fyri børnini var tað ein posi av bommum. Reiður peningur var sjáldan at síggja, segði Jákup Símun Simonsen.

Hann nevndi eisini stóra týdningin, sum klippfiskurin hevur havt fyri Føroyar langt upp í síðstu øld.

Eftir røðuna hjá Jákupi Símun Simonsen var løtan so komin, tá borgarstjórin, Heðin Mortensen, og listarmaðurin, Gianfranco Nonni, avdúkaðu standmyndina at kvinnuni, sum vaskar fisk.

Til hátíðarløtuna spældu fimm ung frá Havnar Hornorkestri, millum annað eina fanfaru til heiðurs fyri standmyndini.

Eftir avdúkingina bjóðaði býráðið til kaffi, te og køkur í Müllers Pakkhúsi.



**TEIR FEGNAST**

*Listamaðurin, Gianfranco Nonni, og borgarstjórin, Heðin Mortensen, fegnast um úrslitið, meðan ungfólk frá Havnar Hornorkestri eru til reiðar at hugna um løtuna*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Einki nýtt um Marco Polo

Leo Poulsen

Tað var í gjáramorgunin, at løgreglan varð boðsend til eitt innbrot, sum hevði verið í Marco Polo nátina fyri.

Løgreglan gjørdi tekniskar kanningar á staðnum, og vónað verður nú, at hesar kunnu føra til eina handtøku av innbrotstjóvinum.

Umframt teksisku kanningarnar hava vit avhoyrt fólk í grannalagnum, og fyri okkum var tað eitt vónbrot, at eingin hevur hoyrt vinkulslíparan, sum nýttur var at skera pengaskápið upp við. Hinvegin hevur nógv arbeiði verið í grannalagnum, so kanska fólk ikki hava givið sær far um ein vinkulslípara, sigur Per Skov Christensen frá kriminaldeildini.

Við Rás2 og Portalin segði Nordin Manai, eigari av Marco Polo, í gjár, at tað var nógv sum bendi á, at innbrotstjóvurin var staðkendur, millum annað tí, hann hevði verið í kjallaranum eftir einum vinkulslípara at skera pengaskápið upp við.

Eg kann bara vátta, at mátin, sum innbrotstjóvurin hevur verið runt í húsinum bendir á, at hann antin hevur verið staðkendur, ella hevur fingið innanhýsis upplýsingar, sigur Per Skov Christensen.

Sambært Nordin Manai vóru einar 70.000 krónur í pengaskápinum, og teimum er innbrotstjóvurin farin avstað við.

*Umframt tekniskar kanningar hevur løgreglan eisini avhoyrt fólk í grannalagnum. Tú skuldi trú, at mann hoyrir ein vinkulslípara, men tað hevur eingin tíverri gjørt, sigur Per Skov Chistensen*

Mynd: Álvur Haraldsen

